gult cyan magenta svart



# Argjamenn fáa onga kapping

*8–mannafør: Í Klaksvík hava teir gjørt av at lata n‡ggjan bát smí›a›. Teir høvdu n‡ggjar árar í Vestmanna, men ta› hilna›ist ikki so væl, sum teir høvdu rokna› vi›*

Ta› er sta›fest á øllum stevnunum, og aftur leygardagin var ta› sjón fyri søgn. Í kappingini ímillum 8–mannaførini, sum er fjølmentari nú, enn hon hevur veri› í mong ár, er spenningurin um fremsta plássi› eingin.

Argjamenn vinna hvørja fer›. Tann spenningurin, sum er, er um hvør skal ver›a fremstur aftanfyri Argjabátin. Í Havnar Ró›rarfelag siga tey, at um Ørvur hev›i havt somu manning, sum hann hev›i í fjør, so høvdu teir væl veri› førir fyri at endurvunni› meistaraskapin. Tann pástandin fer ta› ongantí› at bera til at royna. Veruleikin er, at argjamenn eru bestir í ár.

Aftur leygardagin vístu teir ta›. Áralagi› var gott og sannførandi, og hóast teir onkuntí› hava vunni› vi› størri fjarstø›u aftur til næstu bátarnar, enn teir gjørdu hesa fer›, so var Argjabáturin ongantí› hóttur. Tí ber ikki til at siga, hvussu nógv teir høvdu veri› mentir at lagt í afturat, um teir høvdu veri› hóttir.

Toftabáturin vann enn eina fer› kappingina um næstfremsta plássi›. Munurin aftur til tri›ja bátin var minni enn ein skutur.

Hesa fer› vóru ta› vestmenningar umbor› á Gullbrandi, sum fingu bronsu.



Ta› plássi› hava klaksvíkingar í Nevinum Rey›a annars havt patent uppá.

Hjá klaksvíkingum, sum ógvuliga fegnir vilja endurreisa áhugan fyri kappró›ri har nor›uri, mundi hetta kennast sum eitt vónbrot. Teir høvdu n‡ggjar árar, og teir rokna›u vi›, at ta› fór at vera nytta í longri og lættari árum. Men starturin var vánaligur, og á stutta teininum megna›u teir ikki meiri enn fimta plássi›. Húsavíkingurin enda›i á fjór›a plássinum.

Í Klaksvík hava teir gjørt av, at teir skulu rógva vi› n‡ggjum 8–mannafari komandi ár. Sámal Hansen skal smí›a bátin. Hann hevur longu gjørt árarnar. Ta› vóru árarnar til n‡ggja bátin, sum teir leygardagin ró›u vi› umbor› á Nevinum Rey›a.

**jh**

# Bátasmi›urin orka›i ikki at hyggja

*10–mannafør: Ta› eydna›ist vestmenningum at vinna í heimasjógvi fyri fyrstu fer› í eina hálva øld, og havnarmenn duttu aftur á fjór›a plássi›, tá teir tyngdu um bátin vi› nógvum sjógvi*

Ta› var stórur dramatikkur, tá 10–mannaførini kappa›ust í Vestmanna. Ternan noyddist á Oyrargjógv, og tí var ney›ugt at bí›a eitt sindur. Ta› var stórur fjáltur á monnum, og tá dómarin vildi hava bátarnar at liggja snórabeint yvir ein kamb, gekk ta› ein løta at starta. Bæ›i Vestmenningurin og Nólsoyingurin sleptu fasta startinum, á›renn ta› eydna›ist, og so var ein øgilig kapping.

Um ta› er ein langur startspurtur, ella um talan er um ein langan endaspurt, ta› kann altí› metast um. Veruleikin er, at kappingin ímillum 10–mannaførini á 1000 metrum er heilt ø›rvísi, enn hon er á 2000 metra málinum.

Nólsoyingurin var leingi fremstur, og tískil sá ta› leingi út til, at enn eina fer› skuldi talan vera um eitt vónbrot hjá Vestmenninginum á vestanstevnu í Vestmanna. Kjølur og Eysturoyingurin og eisini Havnarbáturin vóru framvi›, og inntil bara einir tvey hundra› metrar vóru á mál, var møguleiki fyri, at fimm bátar kundu vinna.

Men so var ta›, at Vestmenningur tók sær um reiggj. Kappingin stó› millum hann og Nólsoyingin, og á málinum var munurin ein skutur.

Veldugt kæti í Vestmanna. Vestmenningur hev›i vunni› fyri fyrstu fer› í heimasjógvi í 48 ár, og stevnuh‡rurin fekk í gó›ve›rinum enn eina tonn rætta vegin.

Hugaligt var ta› eisini at sta›festa, at Eysturoyingurin aftur var vi› í kappingini um fremsta plássi›. Ta› eigur at bo›a frá, at hann skal ikki avskrivast á ólavsøku. Í FM kappingini eru bara tveir bátar. Nólsoyingurin skal vinna á ólavsøku, um hann skal taka FM heiti› frá vestmenningum. Ella skal Nólsoyingurin vera tvey pláss frammanfyri Vestmenningin.

## Tungur Havnarbátur

Fyri havnarmenn var ta› eitt stórt vónbrot, at teir duttu heilt aftur á fjór›a plássi›. Ta› kann ikki sigast anna›, enn at teir hjálptu væl til sjálvir.

He›in Hansen er forma›ur í Havnar Ró›rarfelag, og hann ásannar, at fyrireikingarnar vóru ikki serliga hepnar:

– Teir turka›u bátin hóskvøldi›. Talan er um n‡ggjan bát, og tá hann var› flota›ur leygardagin, lak hann illa. Í bátinum var einki at oysa vi›, og teir siga, at ta› vóru millum eitt hundra› og tvey hundra› litrar av sjógvi í honum, tá teir kappa›ust. Ta› er ikki serliga heppi›, tá tú hevur fingi› tær n‡ggjan bát júst tí hann skal ver›a so léttur, sum ta› á nakran hátt ber til, sta›festir forma›urin í Havnar Ró›rarfelag.

Havnarbáturin ver›ur neyvan turka›ur undan ólavsøkuni. Spurningurin er heldur, um hann hevur fingi› nakran ska›a av mistakinum, sum teir – sjálvandi vi› gó›ari ætlan í huga – gjørdu hóskvøldi› í sí›stu viku. **jh**

# Jarnbardur er framúr

*6–mannafør kvinnur: Áralagi› og sannføringin yvir ró›rinum hjá meistarakvinnunum er sum ta› sjáldan er sæ›á›ur*

Kvinnurnar umbor› á Jarnbardi sta›festu leygardagin, at tær eru føroyameistarar. Talan er um sætta FM heiti› hjá Jarnbardi, sí›ani kvinnurnar fóru at kappast í 6–mannaførum í 1983.

Tær flestu, sum hava vunni› FM í ár, vóru vi› til at vinna FM í fjør eisini, og nógvar eiga eisini onnur meistaraheitir í kappró›ri.

Ta› frættist, at onkrar av manningini umbor› á Jarnbardi nú ætla at gevast at rógva, tí teir fara av landinum at útbúgva seg. Tær eiga ein ró›ur á, og ta› er einki at ivast í, at tær fara at vinna á ólavsøku.

Tá ver›ur høvi hjá mongu ásko›arunum, sum plaga at hyggja at kappró›rinum á ólavsøku, vi› egnum eygum at síggja, hvussu væl tær á Jarnbardi rógva. Áralagi› er framúr, og ta› er styrki, kraft og sannføring yvir hvørjum einasta taki.

Tá ein fimtingur av málinum í Vestmanna var rógvin, var Jarnbardur leysur av hinum bátunum, og á málinum vóru tær í hvussu so er tríggjar bátslongdir frammanfyri næstu bátarnar.

Kappingin um næstfremsta plássi› var stór. Gongurólvur blanda›i seg av álvara uppí, men ta› eydna›ist teimum á Hvessingi at enda eina hálva bátslongd frammanfyri.

**jh**



gult cyan magenta svart



# Katrin og Jacklin aftur til Slagelse

*Anja Andersen hevur bo›i› teimum bá›um Katrin á Neystabø og Jacklin Durhuus at koma ni›ur aftur til Slagelse at spæla hondbólt*

Stefan í Skorini



Tá i› ein av heimsins bestu hondbóltsleikarum, Anja Andersen, var í Føroyum fyrr í ár og vandi føroyskar leikarar, seg›i hon, at um hon bar eyga vi› onkran gó›an leikara, so kundi ta› hent, at hon gav teimum møguleikan at spæla vi› Slagelse. Eftir at Anja Andersen gavst at spæla hondbólt, hevur hon veri› venjari hjá Slagelse.

Eftir túrin hjá Anju í Føroyum bjó›a›i hon Katrin á Neystabø úr Neistanum og Jacklin Durhuus úr VÍF at koma ni›ur at venja vi› felagnum. Nú hava tær veri› har ni›ri og vant í eina viku, og hondbóltsevnini hjá teimum bá›um eru eftir øllum at døma sera gó›, tí at Anja hevur givi› teimum eitt tilbo› um at spæla vi› Slagelse í eitt ár fyri fyrst.

Ætlanin er, at tær bá›ar fara aftur til Danmarkar fyrst í august, eftir at A-landsli›svenjingarnar er lidnar. Slagelse skal syrgja fyri, at tær bá›ar fáa eina íbú› at búleikast í, og eisini syrgir felagi› fyri, at tær fáa arbei›i, me›an tær spæla har. Um tær heldur vilja í skúla, er eisini møguleiki fyri tí. Seinni í hesi vikuni skuldu allir hesir smálutirnir koma uppá pláss. Tær skulu búgva í Slagelse, sum er ein b‡ur beint uttanfyri Keypmannahavn vi› 40.000 íbúgvum.

## Gó›ar umstø›ur

Katrin á Neystabø sigur sjálv, at umstø›urnar í felagnum eru avbera gó›ar og kunnu als ikki samanberast vi› tær í Føroyum. Har vóru fólk, sum syrgdu fyri øllum til leikararnar, so at tær bert skuldu hugsa um at spæla hondbólt.

Me›an tær bá›ar vóru í Slagelse var mest konditións- og styrkivenjing á skránni, av tí at spælararnir júst eru byrja›ir aftur eftir summarste›gin.

Máli› hjá Slagelse er at flyta upp í bestu deildina næsta kappingarár, og ta› er eitt ófrávíkiligt krav. Vi› teimum gó›u leikarunum, sum har eru, skuldi hetta ikki veri› heilt ómøguligt.

## Sterkt li›

Anja Andersen er í fer vi› at byggja eitt n‡tt li› upp, og hon hevur keypt fleiri leikarar til felagi›, sí›an kom tók yvir sum venjari.

Slagelse hevur nevniliga eitt sera sterkt li› vi› fleiri gó›um leikarum. Umframt ta›, at Anja Andersen er venjari, spælir navnframa Janne Kolling vi› á li›num. Hon var ein av "jernladies", sum vunnu EM, HM og OL vi› danska landsli›num.

Eisini eru fleiri leikarar frá ø›rum londum. Málverjin er úr Hollandi, leikarar eru eisini úr Su›ur Korea og USA og so ikki at gloyma tær úr Føroyum. Koreanarin hevur leikt fleiri ár vi› einum av bestu feløgunum í Noregi, Bækkelaget, har Anja Andersen eisini leikti, á›renn hon fekk trupulleikar vi› hjartanum.

Tríggir av leikarunum í Slagelse spældu vi› "Dream Team", sum var eitt li›, i› Anja setti saman av teimum allarbestu leikarunum í heiminum. So ta› eru sera gó›ir leikarar vi› altjó›a royndum, sum Jakclin og Katrin skulu royna seg saman vi› í Slagelse.

## Gekk hampuligt

Í venjingini gekk ta› heilt hampuligt hjá teimum, men Anja sjálv var bara til sta›ar tveir av døgunum.

Tá i› Katrin ver›ur spurd, um hon hevur nakrar vónir um at koma á li›i› hjá Slagelse, svarar hon, at Anja Andersen hevur sagt vi› tær, at hon hev›i ikki givi› teimum henda møguleikan, um hon ikki trú›i, at tær kundu koma á li›i›.

Hópurin telur 19 leikarar harav 12 kunnu ver›a vi› í dysti. So ta› er væntandi, at tær sleppa av royna seg á besta li›num. Slagelse hevur eisini eitt 2. deildarfelag, har tær kunnu leika hvørja viku, so at tær ikki missa dystarvenjingina.

Um Anju sigur Katrin, at hon var sera blí› og fitt, men kravdi samstundis eisini naka› av sínum leikarum. At Anja er blí› og fitt, er ikki júst ta›, sum vit, i› bara kenna hana frá sjónvarpinum, vænta av henni.

Katrin sigur, at hon stúrir eitt sindur fyri hesum n‡ggja ævint‡rinum og at flyta til Danmarkar, men man má royna at taka møguleikan, me›an hann er har.

Ta› skerst ikki burtur, at hetta er ein sera stór avbjó›ing fyri tær bá›ar, Jacklin og Katrin. Hetta krevur naka› av teimum, og ta› hjálpir kanska ikki naka› serligt, at tær nú mugu burtur frá familju og vinum, men ein slíkur møguleiki kemur ikki hvønn dag, og tí mugu tær royna at fáa sum frægast burturúr.

# GÍ tapti 3-1 móti Holstebro

*teirra fyrsta venjingardysti í Danmark taptu gøtumenn 3-1 móti Holstebro, men GÍ var frammanfyri í hálvleikinum*

ÍStefan í Skorini

GÍ st‡rdi øllum fyrra hálvleiki, sum hann var, og burdi skora› fleiri mál. Ta› bleiv tó bert til ta› eina máli›, og ta› var Óli Hansen, sum stó› fyri tí. GÍ hev›i fleiri a›rar málmøguleikar, men hepni var ikki vi› teimum. Bólturin fór bæ›i á stongina og tvørtræ›i› - og út.

Í seinna hálvleiki mistu gøtumenn heilt fótafesti›, og Holstebro skora›i ikki færri enn tr‡ mál. Útjavnandi málinum syrgdu gøtumenn sjálvir fyri vi› at beina bóltin í egi› mál. GÍ hev›i eisini møguleikar í seinna hálvleiki og fekk eisini eitt brotsspark, sum tó ikki fór í máli›. Tá var stø›an 2-1 til Holstebro, so GÍ skuldi havt javna›. Endaliga stø›an gjørdist 3-1 til Holstebro, sum dagliga spælir í donsku 2. deild. Mikudagin spælir GÍ sín seinna dyst á venjingarleguni, og ta› ver›ur ímóti Ikast.

# Bogi og Sunnuvá vunnu renningina á vestanstevnu

*Tey bæ›i Bogi Lenvig og Sunnuvá Bjarnastein vunnu rennikappingina á vestanstevnu tepurt, og enn er ikki greitt, hvør fer vinna Grand Prix 2000*

Stefan í Skorini

Serliga var endin á kappingini hjá monnum spennandi, tí Bogi Lenvig og Guttorm Sørensen komu mestsum javnir um máli›. Bogi var bert ta› eina sekundi› frammanfyri Guttorm Sørensen, me›an Marni Joensen kom um málstrikuna sum nummar tr‡ bert ein hálvan minutt eftir teir bá›ar fremstu.

Samanlagt er Bogi Lenvig fremst í Grand Prix 2000, og hann hevur 188 stig. Guttorm er beint í hølunum á Boga, og hann hevur 182 stig. Guttorm skal vinna seinastu kappingina á ólavsøku fyri at tryggja sær samanlagda sigurin.

Um tveir rennarar enda javnir, ver›ur hugt eftir, hvussu teir klára seg á ólavsøku. Kappingin um tri›ja plássi› hjá monnunum er eisini spennandi og ver›ur avgjørd á ólavsøku. Cecil Weihe hevur 125 stig á tri›ja plássi, me›an Sølvi R. Hansen hevur 105 stig.

Hjá kvinnunum var spenningurin eisini stórur, men ta› var tó ikki so javnt sum hjá monnunum. Sunnuvá Bjarnastein var fyrst á mál, og Rigmor N. Joensen var nummar tvey. Nummar tr‡ var Thordis D. Eiriksfoss.

Rigmor hevur annars vunni› tríggjar av teimum fimm kappingunum, sum hava veri› higartil. Vi› sigrinum var›veitir Sunnuvá Bjarnastein spenningin undan tí seinastu kappingini.

Rigmor N. Joensen er fremst vi› 188 stigum, me›an Sunnuvá er á ø›rum plássi vi› 182 stigum. Sunnuvá skal sostatt vinna á ólavsøku fyri at gerast vinnari av Grand Prix 2000. Thordis D. Eiriksfoss hevur longur tryggja› sær tri›ja plássi›.

Ein kapping er eftir, og hon ver›ur á ólavsøku. Hvørki kappingin hjá monnum ella hjá kvinnum eru avgjørdar, og hetta leggur upp til eina spennandi rennikapping á ólavsøku.